# Tjaldursstova heilsar tjøldrunum



**Børnini í Tjaldursstovu í Santa Jósefs Barnagarði í Havn vóru grækarismessudag vesturi í Vágum og leitaðu eftir tjøldrum**

ÚTFERÐ
*Flogvøllurin*

– Vit hava sæð nøkur tjøldur í dag. Beint við vatnið, tá vit koyrdi hertil.

Tey eru væl nøgd við dagin higartil, børnini í Tjaldursstovu í Santa Jósefs Barnagarði í Havn. Barnagarðinum hjá nonnunum.

Tey eru, sum tey plaga hendan dagin, farin út at feðast at vita um tey síggja nakað tjaldur sjálvan grækarismessudag.

Í dag eru tey komin vestur í Vágar gjøgnum undirsjóvartunnilin. Tað liggur væl fyri. Ein praktikantur er við. Hon er úr Sørvági. Og tey ætla sær eisini at vitja barnagarðin í Sørvági seinnapartin, áðrenn tey fara aftur til Havnar.

Nú eru tey á flogvøllinum. Fara at síggja, tá stóra flogfarið, sum stendur á vøllinum, fer avstað. Tey eru spent og veittra til teirra, sum fara við. Øll eru tey ílatin høvuðprýði við einum tjaldri á. Hava sjálv gjørt til dagin.

Men tað er eisini annað, sum er spennandi her í cafeteria á flogvøllinum í dag. Tí í dag eru tey á útferð, og tað merkir, at tey hava ikki vanliga matpakkan við.

– Eg havi gingið ein 20 krónu frá mammu í morgun. So sleppi eg at keypa chips, greiðir ein lítil drongur sera spentur frá.

Og tey eta chips og pylsur og drekka sodavatn og hava tað óføra hugnaligt.

**ej**



## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu tá okkara kæra kona, dóttir, systir, mostur, fastir og abbadidd

**Martha Johansen**
Klaksvík

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri kransar, blómur og gávur til KFUM og K.
Ein serstøk tøkk til tykkum øll ið hjálptu til við jarðarferðini og tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Egil**

## Tøkk

Hjartans takk siga vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu tá ið kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Óli Jóhan Láberg**
Skopun

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, ið hjálptu til.
Tøkk fyri kransar, blómur og aðrar heilsanir.
Eina hjartans tøkk til tykkum á Ellisheiminum á Skerði, ið vóru so góð við hann ta tíðina hann var har.
Eisini til tykkum í Betania takka vit fyri hjálpsemi og stuðul

*Fyri tey avvarðandi*
**Konan,**
**Ove, Tórbjørn, Sólrun og Jónleif v/ fam.**



# Ráðharri steðgar nazi útvarpi

**Ríkiskassin letur árliga 78.000 krónur í stuðuli til eina nazistiska úrvarpsstøð. Hesum vil mentamálaráðharrin steðga**

ÚTVARP
*Eirikur Lindenskov*

Danskri skattgjaldarar skulu ikki longur finna seg í, at staturin letur stuðul til eitt nazistiskt útvarp, sigur Brian Mikkelsen, mentamálaráðharri í Danmark við sjónvarpsstøðina TV2.

Einasta ríkisstuðla naziútvarp í heiminum, Radio Oasen í Greve, fær árliga 78.000 krónur í stuðuli frá Mentamálaráðnum.

Hetta vil ráðharrin broyta.

Danski ríkiskassin hevur stuðla nazi-útvarpinum við sløkum 400.000 krónum seinastu seks árini.

Í løtuni nýtir Radio Oasen m. a. ríkisstuðulin til eina vikuliga ungdómssending við tónleiki, sum stuðlar sonevndum »hvítum valdi«.

Ráðharrin vísir aftur, at hann hevur heimild at taka nøkur stig, og sendir bóltin víðari til løgregluna.

– Løgreglan má hyggja eftir, um tey senda nakað ólógligt, og so má lokalútvarpsnevndin taka stigið, sigur Brian Mikkelsen. Hann leggur undanfarnu stjórnina undir at hava eina »pladderhumanistisk holdning«, tí hon hevur givið nazistunum sendiloyvi.

– Eg vil fegin seta strangari krøv til, hvat sent verður, og hvat vit kunnu lata stuðul til. Men eg havi tikið yvir eina lóg, sum eg eri ímóti, frá undanfarnu stjórn, sigur mentamálaráðharrin.

Leiðarin hjá nazistunum, Jonni Hansen, vil hava góðar orsøkir frá ráðharranum fyri at steingja lokalútvarpsstøðina hjá DNSB.

– Vit liva upp til tær treytir, ið eru galdandi fyri eina ikki handilsliga útvarpsstøð við stuðuli, siugr hann.

# Bókaútgáva

**Tíðindaskriv**




Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út ta grundleggjandi undirvísingarbókina Skriva týskt 1 eftir André Niclasen lærara, sum er ætlað nemingum, ið hava ongan ella næstan ongan for-kunnleika í týskum. Hon er tí væl hóskandi til byrjanarundirvísingina í týskum í fólkaskúlanum fyrst og fremst, men kann eisini vera hent hjá áhugaðum sjálvlestrarfólki yvirhøvur, tá ið ræður um grundarlagið í teirri týsku mállæruni.

Tey ymsu økini í mállæruni verða viðgjørd við frágreiðing, innsetingardømum og umsetingum við tilhoyrandi glosum. Aftast í bókini eru yvirlit við sterkt bendum sagnorðum og tey vanligastu sambindingarorðini. Eisini er ein føroyskur/týskur og ein týskur/føroyskur orðalisti við í hesari útgávuni.

Skriva týskt 1 er 77 blaðsíður. Hestprent hevur prentað. Bókin kostar 80 krónur og fæst í bókabúðunum um alt landið.




**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í Føroya Sparikassa P/F**

friggjadagin 21. mars 2003, kl. 17:00
í B36-húsinum, Gundadalur, Tórshavn.

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki Sparikassans í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum
4. Heimila nevnd at lata Sparikassanum ognast egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Ymiskt

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á stjórnarskrivstovuni Yviri við Strond 2, Tórshavn, frá 13. mars 2003.

Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt men ikki atkvøðurætt.

Atgongdarkort verða á deildum Sparikassans útflýggjað teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi mánadagin 17. mars 2003 hava biðið um hetta.

Tórshavn, hin 21. februar 2003.

Nevndin

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________
Bústaður: ____________
Postnr.: ____________
Bygd/býur: ____________
Telefon nr.: ____________
Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin